

*Johannes Sigurdsson var fremsti samstarvsfelagi hjá Alfred í Íslandi*

at jeg i J.H. Simonsens Sted skal rejse til Reykjavík og arbejde blandt de færøske Fiskere for Guds Rige, saa vil jeg raadføre mig med Dem og A. Gislason, som jeg ogsaa har skrevet til. Pastor Alsing i Vaag, som er Samfundsraadets Sekretær, har maaske underrettet Dem om denne Sag.

Tror De, at vi kan faa en Sal i KFUMs Bygning til at holde Møde i? Sagen er den , at vi kan ikke leje en bestemt Aften i Ugen, for det er ubestemt hvad Tid Fiskerne er i Havn. Jeg tror, at mit Arbejde væsentligt vil bestaa i at holde smaa Møder og Besøg ombord i Skibene, da de jo sjældent er inde i Havn paa engang.

Men da det kan ske, bør vi ogsaa have et sted at samle Fiskerne i om Guds Ord, hvis det er muligt, saa De forstaar nok hvad der behøves.

Jeg skrev til A. Gislason om at tale med Dem, saa hvis I kunde være mig behjælpelig, ville jeg være Jer meget taknemlig. Om Logi har jeg ogsaa skrevet til A. Gislason, maaske jeg kan bo paa KFUM. Det næste er, at Tiden ikke er ret lang.

Da meningen er at komme derover sidst i Februar eller først i Marts og blive til midt i Maj, haaber de vil gøre Deres bedste, skønt jeg ved, De har meget at gøre!

Med Guds Rige gaar det fremad her paa Færøerne, men endnu er der mangen Sømand, der lever uden Jesus.

***Kærlig Hilsen***
Alfred Petersen
Klaksvig
Færøerne

**Jóhannes Sigurðsson, framúr Føroyavinur**

Jóhannes Sigurðsson, fremsti samverkamaðurin hjá Alfred í Íslandi, var føddur 8. apríl 1892, hann doyði 1. november 1979 og hevur tá verið 87 ára gamal.

Jens Pétursson, formaður fyri føroyska sjómansheiminum Ørkin í Reykjavík, hevur arbeitt saman við honum í sjey ár á eini prentsmiðju. Jóhannes var prentari, og Jens hevði fyrifallandi arbeiði á prentsmiðjuni. Jóhannes plagdi onkuntíð at greiða frá arbeiðinum. Serliga tók hann til ta ræðuligu hendingina við "Acorn" í 1928, sum eisini er greitt frá í Miðvikuni.

Jóhannes hevði sjómannaarbeiði afturat tí vanliga yrkinum, so hetta hevur verið serstakliga strævið.

Jóhannes var formaður í Kristniboðsfelagnum Kalla, og hann var fleiri ferðir í Føroyum. Sambært einum postkorti, sum Alfred Petersen skrivaði til Fríðrik Fríðriksson í 1925, var Johannes í Føroyum tá. Seinast var hann í Føroyum, tá Missiónshúsið við Landavegin varð vígt í 1972.

Alfred var 12 fylgjandi ár 1923-1934 á hvørjum vári í Reykjavík Ein part av sumrinum 1923 var hann eisini á Eysturlandinum

**Eisini til Grønlands**

Sum frá leið fóru fleiri og fleiri fiskimenn eisini til Grønlands. Samstundis gjørdist Grønland eisini meira og meira opið. Føroyingar fingu tá Føroyingahavnina, sum gjørdist høvuðshavnin hjá føroyingum í Grønlandi.

Men her var ikki møguligt at fáa tak yvir høvdið, um okkurt barst á. Eitt dømi um hetta er, at meslingaárið 1935 máttu saltskúrur tømast og koyggjur smíðast til sjúku menninar. Ein kabúss varð tikin úr einum strandaðum skipi, so menninir kundi fáa hita. Allir sluppu við lívinum, men tað vóru ikki allir sum sluppu uttan mein orsakað av hesum umstøðum.

Á heysti 1934 sendi Alfred Petersen skriv til Grønlandsstyrelsen um at fáa fría ferð við skipi hjá stýrinum til Grønlands at kanna viðurskiftini, og hetta var eisini játtað honum.

Seinnapart á sumri 1935 tók Alfred upp spurningin um at byggja eitt sjómansheim í Føroyingahavnini á fundi í samfundsráðnum hjá Heimamissiónini í Føroyum. Hann fekk beinanvegin stuðul fyri uppskotinum, ikki minst frá Valdemar Lützen, sum var ein eldhugaður stuðul hjá missiónini. Tað sama var við Bang Jensen, presti. Aðrir vóru meira ivasamir og hildu uppgávuna vera ov tunga. Tíðirnar vóru jú ringar í Føroyum eins og aðra staðni.

Men nú var at fara at savna pening til endamálið, og tað kom væl at peningi inn. Tað komu kr.10.000 inn í fyrstu syftu, hetta var nógv tá.



*Inni í Frederikshaab á veg til Føroyingahavnina at byggja sjómansheim.* ***F.v.*** *Peter Strøm, Arne Bertoldsen, Alfred Petersen og Torkil Strøm*

Tann 23. apríl fór Alfred úr Føroyum til Danmarkar saman við N.P. Strøm, byggimeistara, Torkil Strøm, timburmanni og Arna Bertoldsen, allir úr Vági.

Í Keypmannahavn varð alt byggitilfarið keypt umframt øll útgerð til sjómansheimið og matur fyri summarið.

Farið varð úr Keypmannahavn 12. mai við grønlandsskipinum Gustav Holm. Teir høvdu 19 dagar til Frederikshaab, og í Føroyingahavnina komu teir 2. juni.

## Skjótt bygt sjómansheim

Nú varð so farið at byggja húsið. Tað gekk skjótt og væl. Ja, tað gekk so skjótt, at sjómansheimið varð vígt longu 2. august av prestinum Schultz Lorentzen frá Nuuk. Umframt hann talaðu við vígsluhátíðina Peter Strøm og Alfred sjálvur.

Nú kundi ein partur av húsinum nýtast til at hava møti í. So skjótt sum skilaveggir vórðu settir upp, vóru sjúkir menn lagdir inn. Hetta vísti, hvussu stórur tørvurn var á bæði sjómansheimi og sjúkrahúsi í Føroyingahavnini. Lækni var eingin í Føroyingahavnini tá, men teir høvdu ein danskan diakon, sum gjørdi mat á sjómansheiminum og sum eisini royndi at taka sær av teimum sjúku.

Húsasmiðirnir fóru heim við farmaskipinum Varild, sum var komin eftir fiski, tann 10 august. Alfred sjálvur fór heim við Ananu tann 29. september og 10. oktober var hann aftur í Føroyum.

Í 1937 kom Hans Egede inn á Havnina á veg til Grønlands eftir teimum. Tá fóru við Signhild Hansen og Lovisa Hansen, sum skuldu taka sær av tí húsliga á sjómansheiminum. Ansgar Jensen, ættaður av Hellunum skuldi mála heimið og so var tað Alfred sjálvur.

Tað vóru 90 skip inni í Føroyingahavnini hetta ár, so tað var nærum ikki dagur, at einki skip lá inni. Eisini vóru tað einir 15-20 sjúkir menn, sum komu á sjómansheimið.

Hetta var annars eitt heim í orðsins rætta týdningi. Her komu fiskimenn og aðrir at hugna sær og at skriva brøv. Okkurt ár vóru send 2.300 brøv frá Lívd, sum heimið at.

So vóru eisini andakir og møtir, sum sjóðaði menninar saman. Eisini fingu tey loyvi til at senda gudstænastu sunnudag og møti sunnukvøld frá radiostøðini í Føroyingahavnini.

Í 1936 bygdi løgtingið og vinnufeløgini eitt lítið sjúkrahús, men í 1937 bygdi danska stjórnin eitt størri sjúkrahús í Føroyingahavnini.

Tað er eingin ivi um, at sjómansheimið Lívd í Føroyingahavnini hevur havt ómetaligan stóran týdning fyri føroyingar og aðrar við. Serliga eftir kríggið vóru tað hundraðir, kanska túsundir, fiskimenn, útróðrarmenn, arbeiðsfólk og onnur í Føroyingahavnini. Hetta hevur Jógvan Arge skriva meira um í røðini "Teir tóku land."

Í 1941 skipaði Alfred fyri, at Meinhard Hansen úr Miðvági kom at virka sum sjómanstrúboðari í Aberdeen. Seinni gjørdist tað Hans J Ellingsgaard, sum eisini virkaði í Grønlandi. Esmar Jacobsen var fleiri ár í Vestmannaoyggjunum.

So okkara siglandi fólk hevur alla grund til at minnast Alfred Petersen og tey, sum arbeiddu saman við honum, við takksemi.

Alfred doyði í 1969.

**Komandi partur**

Í sætta og seinasta parti ferð Gerda at arbeiða hjá T.F. Thomsen. og tey bæði, Gerda og Poul, fara at reka hotell

Sosialurin